


# MEST kannar marknaðin í Orknoyggjunum

**Jan Müller**

04.03.2015 - 04:01

Oljan.fo

Í næstum fara stjórin í MEST og ein av nevndarlimunum og eigarunum, Petur Jacobsen, til Orknoyggjarnar at kanna marknaðin har. Hetta skrivar The Orcadian, størsta blaðið í Orknoyggjunum. Vitjanin verður 9. ig 10. mars, og fara føroysku umboðini at vitja ymsa staðni í oyggjunum fyri at vita, um tað kunnu vera uppgávur, ið MEST samtakið kann átaka sær. Hetta er sum so bara eitt framhald av tí nógva virksemi, sum Mest og dótturfelag tess, PAM, hava staðið fyri nú í eina tíð, og har roynt verður at finna samtakinum uppgávur hjá grannunum eisini umframt í olju- og frálandsvinnuni.

Á ferðini verður eisini Johan Mortensen, ráðgevi, sum sambært blaðnum leingi hevur roynt at byggja brýr millum oyggjabólkarnar.

Sambært útvarpinum í kvøld fara føroysku umboðini at vitja bæði privatar fyritøkur og almennar stovnar.